TVØROYRAR KOMMUNA

## Svimjihøllin

**Frá 16. mars 2008 er svimjihylurin á Tvøroyri er opin soleiðis:**

**Týsdag & tórsdag**
kl. 16.00 til 19.00 Børn og vaksin
**Fríggjadag**
kl. 17.00 til 20.00 Børn og vaksin
**Leygardag**
kl. 13.00 til 14.00, Kvinnur
kl. 14.00 til 17.00, Børn og vaksin
**Sunnudag - ókeypis**
kl. 8.30 til 10.30

Opið er eisini í skúla-frítíðini.

**Stongt**:
Nýggjársdag, Skírhósdag, Langafríggjadag, Páskadag, 2. páskadag, Dýra biðidag, Kr. Himmalsferðaradag, Hvítsunnudag, 2. hvítusunnudag, Jóansøka, Ólavsøkuaftan, Ólavsøkudag, Jólaaftan, Jóladag, 2. jóladag Nýggjársaftan

Kostnaðurin er kr. 15,- fyri vaksin og kr. 5,- fyri børn. Sunnudagin er ókeypis.

**Svimjihøllin hevur tlf. 372266 / 371871**

## Námsfrøðingur, Barnagarðurin á Svangaskarði, Toftir

**Søkt verður eftir:**
- 1 námsfrøðingi at arbeiða 35-40 tímar um vikuna, at byrja **01.05.08** ella so skjótt sum tilber.

Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í starvið tíðaravmarkað.

Barnagarðurin er ætlaður 55 børnum, hevur tvær stovur, Sóldøgg og Sólareyga, har børnini hava sítt tilknýti.
Ein verkstað, Sólarglottin, har børnini gera ymiskt ítriv. Hvønn dag eru 7 børn úr hvørji stovu á verkstaðnum.
Vit arbeiða við "Trin for trin".
Barnagarðurin liggur við stadionøkið á Svanga-skarði, tætt við náttúruna og við nógvum møgu-leikum at vera úti.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Dugir at seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Hevur góð samstarvsevnir og kann taka ábyrgd
- Er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagog-felag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í skala 11-17, hjálparfólk í skala 1-5.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Ingrid Hansen, leiðara á tlf 448760/565021

**Umsóknir**
saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða Nes kommunu í hendi í seinasta lagi **31.03.2008 kl. 12.00.**

**Nes Kommuna**
650 Toftir
www.nes.fo
nes@nes.fo

## Stuðulsfólk til Eiðis skúla.

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki 15 tímar um vikuna. Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pedagogfelagið.

**Tann, ið settur verður skal:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- verða við og taka sær av mennandi stuðulsarbeiði
- duga at samstarva við leiðslu, lærarar og foreldur
- verða fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum

Starvið verður at seta frá **31. mars 2008 til 26. juni 2008 .**

Meira kann fáast at vita um starvið frá fyrstalæraranum Tom Joensen á tel. 42 35 79 ella 22 90 45.

Umsóknir skulu vera fyrstalæraranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 25. mars kl. 12.00.

**Eiðis skúli**
Postrúm 29
470 Eiði

*Eiðis skúli hevur undirvísing í 1. – 7. árgangi. Skúlin er væl útgjørdur við serstovum, lærarahølum og ítróttahøll og hevur góðar umstøður til næmingar og lærarar. Í skúlanum eru 9 lærarar, 2 stuðlar og 72 næmingar.*

## Norðoya Røktarheim
## 700 Klaksvík

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysa-rum til heimið frá **01. juni til 31. august 2008.** Vit søkja avloysarar fyri sjúkrarøktar-frøðingar, sjúkrahjálparar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar.

Heimið hevur 2 deildir við 18 búplássum á hvørjari deild. Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og autorisation, verður at senda til:

Att: Leiðarin
Norðoya Røktarheim
FO-700 Klaksvík.

**Umsóknarfreist 14. apríl 2008.**

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við